# Oddagrein

**Eirikur Lindenskov**
*eirikur@sosialurin.fo*



# NEVND OG LEIÐSLA DUGDU IKKI

So reyk Eik Banki, og eitt punktum er sett fyri hendan 178 ára gamla peningastovnin - sum var hin fyrsti í Føroyum - og sum hevur havt so stóran týdning í samfelagnum.

»Vit hava ikki dugað nóg væl. Tað er orsøkin til, at bankin fór«, staðfesti Odd Bjellvåg, nevndarformaður á tíðindafundi í gjárkvøldið - beint eftir at staðfest varð, at Finansiel Stabilitet yvirtekur bankan.

Tað skal valdast vána stýring, og tað er helst væl skilligt, at landið ikki vildi taka um endan, tá útlit kanska vóru fyri enn størri tapi fyri landskassan. At orðaskiftið nú fer at snúgva seg um fíggjareftirlit og vantandi innlit hjá føroyskum politikarum, tað virkar sum uttanumtos.

Formaður Tjóðveldsins, sum annars er eitt »bankakreppuprodukt« sum politikari, kundi væl havt tryggjað hesi viðurskifti, tey seks árini hann ráddi fyri borgum í Tinganesi. Fíggjarmálaráðharrin og løgmaður hava helst bara handlað út frá veruleikanum, sum hann er. Vónandi spyrt ikki eitt køvandi kegl burtur úr hesum, hóast politiska skipanin nú má taka seg saman og tryggja viðurskiftini kring fíggjarstovnar framyvir.

Tað er nógv, sum nú talar fyri, at Tryggingarfelagið Føroyar verður partur av nýggja bankaeigaranum. Sambært Jørn Astrup Hansen er tað mest sum ein vanlukka, at Sparikassar sluppu at broyta seg til bankar, uttan at bygnaðurin kring felagið varð broyttur. Hetta tí at tað gav leiðsluni sjálvari alt ov víðar heimildir, tí tað í veruleikanum var leiðslan, sum stýrdi nevndini - og ikki øvugt.

Er talan ikki um júst sama trupulleika í Tryggingarfelagnum? Nevndin er jú vald av umboðsráðnum, sum er eitt alt ov stórt og tungt apparat til at flyta nakað sum helst. Mest sum ein gomul kommunistisk leivd, ið verður samantvinnað við eina modernaða marknaðardrivna fyritøku. Skipanin við umboðsráðnum er í heila tikið marghátlig, og mannagongdin við, hvussu atkvøðuseðlar verða býttir út er beinleiðis ódemokratisk, har tað valevnið, ið




megnar at fáa Tryggingarfelagið at senda flestar atkvøðuseðlar út, hevur besta kjansin. Hví kann felagið ikki senda øllum tryggingartakarum atkvøðuseðil, so øll fáa sama møguleika at velja?

Skal TF Holding keypa Eik - kanska saman við landsstýrinum - so má tað vera eitt krav, at Tryggingin sjálv verður umskipað soleiðis, at hon lýkur tær organisatorisku reglur, sum galda fyri eina sunna fyritøku á privata marknaðinum.

Astrup spyr, um vit einki hava lært av 1992. Vit hava so ikki lært nóg mikið. Men vit mugu ikki skapa eina nýggja organisatión, har tað er stjórnin, sum stýrir nevndini.

**Vit hava so ikki lært nóg mikið av 1992**

# Edmund søkir doktara



Eins og vanligt er hjá politikarum uttanlands hevur Edmund Joensen, løgtings- og fólkatingsmaður havt sín egna samskiftisráðgeva. Ein samskiftisráðgevi er tað sum tey uttanlands kalla fyri »spindoctor« - ein sum hjálpir og ráðgevur politikaranum.

Higartil hevur Edmund Joensen havt ein útbúnan journalist í starvi, men hesin er nú farin í kunningarstarv hjá Tórshavnar kommunu.

Í starvslýsingini hjá Edmundi, sum er at síggja á heimasíðu hansara, www.edmundjoensen.fo stendur, at talan er ikki um fast starv, tí ætlanin er, at ein ella fleiri uttanhýsis samskiftarar skulu kunna loysa uppgávurnar. Og so nevnir hann uppgávur so sum strategiska sparring um samskiftisfakligar og politiskar spurningar, at menna hugskot á samskiftisøkinum, vera við til at fyrireika røður í samstarvi við Edmund og at menna heimasíðuna.

Av førleikum væntar Edmund Joensen sær, at viðkomandi hevur góð samstarvsevni, royndir frá fjølmiðlaarbeiði, nøs fyri teirri góðu søguni, arbeiðir skjótt og er kortini nágreiniligur

Av útbúgving væntar Edmund sær, at viðkomandi hevur samskiftisliga, samfelagsliga ella aðra líknandi útbúgving - og samsýning verður eftir avtalu.

Sum fólkatingsmaður fær Edmund Joensen játtan at seta fólk at hjálpa sær. Tað fáa løgtingsfólk ikki, men Edmund røkir bæði løgtings- og fólkatingsstarvið fulla tíð, so kanska samskiftisráðgevin hjá fólkatingsmanninum eisini kann hjálpa løgtingsmanninum.

Hin føroyski fólkatingsmaðurin røkir eisini bæði størvini - og hann hevur eina heila umsiting saman við ørðrum av grønlendsku fólkatingsumboðunum, sum Fólkatingið rindar fyri.





## Premieraður fyri fallit

SÓLVIT SIMONSEN
KJAK Á SÍÐU 33



## Nøkur orð til Gerhard

SÓLBORG DULAVÍK
KJAK Á SÍÐU 27

# Sum strudsurin

»If nothing else works, then a total pig-headed unwillingness to look facts in the face will see us through.«

Orðini átti General Melchett í skemtirøðini um Blackadder, men týdningurin var júst tann sami, tá Høgni Hoydal í gjár førdi fram, at landsstýrið skuldi nokta at sagt ja ella nei til bankabjarging, men ístaðin kravt longda tíðarfreist. Veruleikin var nevnliga, at longd tíðarfreist ikki stóð á matarlepanum, og sum løgmaður fleiri ferðir segði, so mátti politiska skipanin fyrihalda seg til veruleikan.

*Vita halda:*

*At gera sum strudsurin, so ljóti veruleikin ikki er sjónligur, er ikki ein møguleiki, sum sømir seg, tá helvtin av føroyska bankakervinum stendur í andaleypi.*

# Hvussu nógv?

Enn hevur eingin fortalt okkum, hvussu nógvar pengar stjórarnir í Eik fingu fyri at fara frá.

Tá nú tapið er staðfest, og nógv ganska almindilig fólk hava mist nógvar hart vunnar sparikrónur, sum eru settar í partabrøv í Eik, og nógv børn hava mist eina stóra uppsparing, sum bláoygd foreldur hava keypt teimum partabrøv fyri, so tey kunnu hava nakað at standa ímóti við, tá tey skulu út í vaksnamannalívið, so skylda frákoyrdu stjórarnir í Eik at fortelja okkum, hvussu nógvar milliónir teir hava fingið fyri at fara frá.

*Vita halda:*

*At teir als einki skuldu fingið. Hava teir rætt til tað sambært sáttmálum, so áttu teir at víst seg sum menn og latið bankanum pengarnar aftur, ella til dømis latið teir til Barnabata.*

*Alt annað er órættvíst og prógvar eina totala arrogansu.*



**Sosialurin** Tel. 341800 www.sosialurin.fo

Stovnaður: 1927
Ábyrgdarblaðstjóri: Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
Útgevari: Sp/f Sosialurin

Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
Avgreiðsla: mán - frí
kl. 08.00 - 16.00

**Marknaðardeild**
lysing@sosialurin.fo

**Tórshavn** Tórsgøta 1, Postboks 76, 100 Tórshavn
tel. 341800, fax 341801, post@sosialurin.fo

**Norðoyggjar** Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687, klaksvik@sosialurin.fo

**Suðuroy** tel. 375364, fax 375464, tel. 228814,
aki@sosialurin.fo, dagfinn@sosialurin.fo

***Haldarar,*** *sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja tel. 341818 frá kl. 8.00 til 20.00 og boða frá.*